

*Eftir at hava verið burturi frá listini í 18 ár, er Jórunn Dánialsdóttir vend heim aftur til sítt gamla yrki. Í samband við sín 60 ára føðingardag í komandi mánað, letur hon upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Aftan fyri hana síggjast tvey av hennara nýggju verkum*
*Myndir Jens Kristian Vang*

> *- Eg vil siga, at eg eri meir bevíst um tað, eg geri nú, enn fyri 20 árum síðan. Tráanin eftir at gera list er so mikið stór, at hvør løta eg arbeiði, er ein gáva. Eg kenni meg priviligeraða, sigur Jórunn Dánialsdóttir*





að listaframsýningar við verkum hjá menningartarnaðum gjøgnum árini.

- Eg veit ikki rættiliga, hvaðani hesin samskipanarhugurin kemur. Møguliga býr ein lítil fyriskipari í búkinum, sum kemur til sjóndar í slíkum støðum, sigur hon og smílist.

Ein av framsýningunum, Jórunn Dánialsdóttir hevur samskipað, er nógv umtalaða Realskúlaframsýningin, og í Dagtilhaldinum skipaði hon fyri myndaframsýning við brúðarmyndum og eina við barnamyndum. Næsta verkætlan verður uttandura myndir av børnum, ið spæla. Ætlanin er, at hesar myndirnar skulu vera frá 1900 talinum, og fram til 1970 árini, altso áðrenn myndirnar fingu lit, sigur hon.

## Barnið flutti fjøll

Tað er stutt síðan, at Jórunn Dánialsdóttir valdi at fara aftur til sítt gamla yrki. Tímaglasið er viðvent, nú 60 ára føðingardagurin stendur fyri framman, og tað var líka sum tað mest nátúrliga fyri hana.

- Tað eru 18 ár síðan eg gavst við hesum arbeiðnum. Nústani føli eg, at eg eri í ferð við at fáa yvirskot aftur. Børnini eru vorðin vaksin og meir sjálvstøðug, og eg havi meir tíð um hendi. Eg átti mítt fyrsta barn sum 17 ára gomul, eigi nú fýra, og havi tí havt børn í meir enn 40 ár, sigur hon smílandi.

Tað, at fáa eitt barn við Downs syndrom, hevur flutt fjøll í lívunum hjá Jórunn Dánialsdóttir og manninum. Hóast Jórunn Dánialsdóttir er fegin um sína nýggju tilveru, vildi hon onga løtu verið tær upplivingar fyri uttan, hon hevur fingið umvegis Javna, ÍSB, stuðlum og øðrum. Øll tey fólk, hon er komin í samband við, allar upplivingar, ið fylgja við at hava eitt barn við Downs syndrom, hava bara verið positivar, greiðir hon frá.

Listarliga verðin er sjálvsagt broytt nógv, síðan Jórunn Dánialsdóttir fyri 18 árum síðan pakkaði seymimaskinuna burtur. Handverkið er tað sama, men teknikkirnir nýggir. Hon trongdi tískil til eina innspræning av onkrum slag, og gjørdi tí av at fara ein túr til Holbæk Kunsthøjskole, har hon fór at fáast við máling, sum er nýtt fyri hana. Aftur komin valdi hon at taka av einum tilboði hjá Føroya Heimavirkisfelag, sum bjóðar skeið undir heitinum, kreativ brodering, har tað eisini verður arbeitt nógv við seyming. Skeiðið er í 8 modulum, og tær 9-11, ið luttaka á skeiðnum, verða lidnar í september. Úrslitið er vorðið til rúgvismikla savning av verkum, hon hevur evnað úr brodering, seyming, máling og tekning.

- Eg vil siga, at eg eri meir bevíst um tað, eg geri nú, enn fyri 20 árum síðan. Tráanin eftir at gera list er so mikið stór, at hvør løta eg arbeiði, er ein gáva. Eg kenni meg priviligeraða, sigur Jórunn Dánialsdóttir.

Føðingardagsframsýningin við verkum hjá Jórunn Dánialsdóttir, verður í Smiðjuni í Lítluvík í tíðarskeiðnum 6.-10. mars.